

# Her vitja tey kongaligu

**Stórt arbeiði er lagt í at fyrireika hesa kongaligu vitjanina. Serliga nógv er gjørt burtur úr, tí serstøk er løgd fyri drotningahjúnini og ein serstøk skrá fyri knúnprinsahjúnini**

KONGAVITJAN

Endaliga skráin fyri vitjanina er nú løgd. Og niðanfyri prenta vit skránna, sum vísir hvar drotninga- og krúnprinsahjúnini verða dag fyri dag.

## Mánadag – fyrrapart:

**Havn:** Kongaskipið "Dannebrog" kemur á Havnina kl. 9 mánamorgunin. Jóannes Eidesgaard tekur ímóti drotninga- og krúnprinsahjúnunum á Bursatanga.

Havnar Hornorkestur spælir og Brandur Enni syngur.

Fyrrapartin vitja drotninga- og krúnprinsahjúnini Landsstýrið í Tinganesi, og seinni Løgtingið.

Tórshavnar Býráð tekur ímóti drotninga- og krúnprinsahjúnunum við standmyndina í Vágsbotni og hugt verður at sluppuni Westward Ho. Síðani er Tórshavnar Býráð vertur við ein morgunmat í Müllers Pakkhús.

Krúnprinsahjúnini vitja Margarinfabrikkina.

Handað verða heiðursmerki umborð á kongaskipinum "Dannebrog".

## Mánadag - seinnapart

**Havn:** Seinnapartin vitja drotningahjúnini Landssjúkrahúsið og nýggja ellis- og røktarheimið Tjarnargarður.

Síðani verður vitjað á Fornminnissavninum og drotningahjúnini leggja grundarsteinin til Hoyvíkar kirkju. At enda verður vitjað hús William Heinesens.

Seinnapartin vitja krúnprinsahjúnini Dagstovnin á Hamrinum, Listasavn Føroya og Færøernes Kommando í Mjørkadali.

Um kvøldið er løgmaður vertur við ein døgurða í Norðurlandahúsinum. Konsert verður við Eivør Pálsdóttir og Deja Vu, mótasýning v. Guðrun og Guðrun, eins og Borgný D. Patursson.

Annars hevur Tórshavnar Býráð eina lýsing í blaðnum í dag, har meiri nágreiniligt er sagt frá vitjanini í høvuðsstaðnum.

## Týsdag - fyrrapart

**Sandur:** Kongaskipið kemur á Sand.

Páll á Reynatúgvu, borgarstóri við fylgi tekur ímóti drotninga- og krúnprinsahjúnunum. Vitjað verður í kirkjuni og bygdarráðshølunum.

## Týsdagin seinnapart

**Vágur og Trongisvágur:** Kongaskipið "Dannebrog" kemur á Vág.

Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri tekur ímóti. Vitjað verður Ruth Smith savnið, sluppina Jóhonnu og Ullvirkið Sirri.

Morgunmatur verður á Hotel Bakkin.

Seinnapartin koma drotninga- og krúnprinsahjúnini til Trongisvágs, har Kristin Michelsen, borgarstjóri tekur ímóti. Vitjað verður í Gallerí Oyggin, fyrrverandi Kongaliga Einahandilin og Suðuroyar Sjúkrahús/Ellis og Røktarheim.

Um kvøldið er døgurði í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

## Mikudag - fyrrapart

**Klaksvík og Viðareiði:** Kongaskipið "Dannebrog" kemur á Klaksvík. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri tekur ímóti. Drotningahjúnini vitja Sambýlið á Heygnum, Norðoyatunnilin og Christianskirkjuna.

Krúnprinsahjúnini vitja á Viðareiði har Árni Absalonsen borgarstjóri tekur ímóti.

Í býráðshølunum í Klaksvík hitta krúnprinsahjúnini australiarar, sum eru búsettir í Føroyum.

Morgunmatur verður í Skálanum í Klaksvík.

## Mikudag - seinnapart

**Fuglafjørður, Leirvík, Elduvík og Gjógv:** "Brimil" kemur inn á Fuglafjørð við drotninga- og krúnprinsahjúnunum. Sigurd Simonsen, borgarstjóri tekur ímóti.

Koyrt verður til Leirvíkar, har Dánjal Andreasen, borgarstjóri tekur ímóti. Vitjað verður á Bátasavninum og útgrevsturin Toftanes.

Seinni seinnapartin vitja drotningahjúnini í Elduvík, har Rodmundur Nielsen borgarstjóri tekur ímóti. Rúni Brattaberg operasangari syngur.

Krúnprinsahjúnini vitja norðuri við Gjógv, har Heðin Zachariasen borgarstjóri tekur ímóti.

## Hósdag - fyrrapart

**Sørvágur, Gásadalur, Sandavágur, Mykines og Miðvágur:** Kongaskipið kemur á Sørvág. Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri við fylgi tekur ímóti.

Drotninga- og krúnprinsahjúnini vitja í Gásadali, har frú Adela Jacobsen tekur ímóti.

Drotningahjúnini vitja í Sandavági, har Rósa Samuelsen, borgarstjóri tekur ímóti.

Vitjað verður í barnagarðinum "Sóljugarður".

Fyrrapartin vitja krúnprinsahjúnini í Mykinesi. Oskar Joensen tekur ímóti.

Drotninga- og krúnprinsahjúnini koma til Miðvágs, har Napoleon Magnussen tekur ímóti.

Morgunmatur verður í Miðvágs skúla.

## Hósdag - seinnapart

**Vágar og Danmark:** Seinnapartin hósdagin verður tíðindafundur á Hotel Vágum.

Fráferð við flogfari til Damarkar.